betri DEILDIN

# LEIKSKRÁ

4. apríl 2023

SKRÁ NR. 2




DÁNJAL Á LAKJUNI NR. 7

ARGJA BÓLTFELAG 1973

# 4. UMFAR

# HAVSBRÚN

P/F Havsbrún • P.O. Boks 81 • 530 Fuglafjørður
tel. 41 44 00 • fax 41 44 01
havsbrun@havsbrun.fo • www.havsbrun.fo



# Ítróttarfelag Fuglafjarðar

Fløtugerði - 530 Fuglafjørður
tel. 228771 if@if.fo www.if.fo

**Útgevari og ábyrgd**
ÍF-fótbóltur - Atli Petersen

**Sniðgeving og uppsetan**
Maibritt P. Bærentsen


betri.fo
Betri tannár
Til tín millum 13 og 17 ár
Kort
Netbanki
Nýtslukonta
Uppsparingarkonta
Boðtænasta
Fá ein ryggsekk, tá tú bíleggur títt fyrsta kort
Vitja eina av deildum okkara
betri
betri
betri

# INNIHALD


Dysturin í dag

Støðan í Betri deildini

TEAM ÍF

TEAM AB

Dómarar

ÍF-kvinnurnar 2023

Toppskjúttar eftir 1. umfar

Søgubrot 2

ÍF-sangurin




INTERSPORT®
intersport.fo

taf.fo
the athlete's foot®



TEKST: **BIRGIR PETERSEN**

# DYSTURIN Í DAG

Vælkomin til fyrsta heimadystin hjá okkum í fremstu deildini, Betri-deildini, í ár. Fyrsta umfar vóru vit vestri á Dungasandi og skuldu royna okkum ímóti 07 Vestur, men vit vóru tíverri við undirlutan og taptu 1-0 eftir at tað hevði leika javnt á. Merkisvert var at dysturin var væl leiktur, serliga tá vit hugsa um at tað kann vera sera svingandi við góðskuni so tíðliga í kappingini. Eisini sóu okkara menn út til at hava fyrireika seg væl uppá at vera klárir til hetta kappingarárið, so vónirnar eru góðar at vit kunnu fáa okkurt stig í hús nakað skjótt. Serfrøðingarnir geva okkum ikki teir heilt stóru møguleikarnar at sleppa undan at flyta niður aftur beinan veg, vit mugu bara gera okkara fyri at vísa at teir eisini kunnu taka feil viðhvørt.

Nú bleiv fyrsti dysturin, sum upprunaliga skuldi verið 11. mars útsettur vegna kava og illveður, og so kom landsliðssteðgurin eisini ímillum, so spennandi verður at síggja um okkara menn hava klára at hildi seg í gongd, tí nú eru vit komin út í apríl, so steðgurin gjørdist nokkso langur.
AB hevur eins og vit síni fyrstu stig til góðar, so væntast kann at teir koma at leggja nógv fyri, fyri at koma uppá stigatalvuna. Í fjør lógu teir beint omanfyri niðurflytingarstrikuna tá kappingarárið var liðugt, og vænta tey flestu at vit koma at kappast innanhýsis um at sleppa undan niðurflyting, tá hugsa verður um at vit júst eru fluttir upp.
Nú eru allir leikarnir hjá okkum tøkir, uttan Sámal, sum er í Danmark 1 mánaða aftrat, og fara teir at gera alt fyri at fáa fyrstu stigini á konto, sigur venjarin Alex. Hann vónar at nógvir áskoðarar koma at stuðla liðnum, tí hetta er jú tað, sum leikarnir liva uppá.

**Góðan dyst øll somul.**
**Koyri á drongir**




**BÓLTASTUÐUL:**
Benny Andreasen



VÓNIN®

MILLUM FREMSTU MENNARAR,
FRAMLEIÐARAR OG VEITARAR AV
DYGDARGÓÐUM FISKIREIÐSKAPI

# EFTIR 1. UMFAR

# STØÐAN

## Í BETRI DEILDINI HJÁ MONNUM

| NR | LIÐ | D | V | J | T | VM | TM | MM | S |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 1 | KÍ | 1 | 1 | 0 | 0 | 7 | 1 | +6 | 3 |
| 2 | HB | 1 | 1 | 0 | 0 | 4 | 1 | +3 | 3 |
| 3 | B36 | 1 | 1 | 0 | 0 | 3 | 0 | +3 | 3 |
| 4 | EB/Streym | 1 | 1 | 0 | 0 | 2 | 0 | +2 | 3 |
| 5 | 07 Vestur | 1 | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | +1 | 3 |
| 6 | ÍF | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 1 | -1 | 0 |
| 7 | AB | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 2 | -2 | 0 |
| 8 | B68 | 1 | 0 | 0 | 1 | 0 | 4 | -2 | 0 |
| 9 | Víkingur | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 3 | -3 | 15 |
| 10 | TB | 1 | 0 | 0 | 1 | 1 | 7 | -6 | 0 |

WWW.DYSTIR.FO

## 4. UMFAR

| | |
|---|---|
| 01.04.23 | Víkingur - TB |
| 02.04.23 | KÍ - EB/Streymur |
| 02.04.23 | 07 Vestur - B68 |
| 02.04.23 | ÍF - AB |
| 03.04.23 | B36 - HB |

## 5. UMFAR

| | |
|---|---|
| 08.04.23 | B36 - B68 |
| 08.04.23 | EB/Streymur - TB |
| 08.04.23 | HB - AB |
| 08.04.23 | 07 Vestur - KÍ |
| 08.04.23 | ÍF - Víkingur |

# KES.FO

HVS - VENTILATIÓN - HITAPUMPIR - SERVICE

Hjá Klima Energi Service leggja vit okkum eftir at veita dygdarvørur og -tænastur innan hita, ventilatión og orkuoptimering. Harafturat bjóða vit eftirlit av hitapumpum og ventilatiónsskipanum, bæði til privat og vinnu.

Tørvar tær eina nýggja hitapumpu ella ventilatións- og luftskiftisskipan, ella vilt tú hava vegleiðing um orkuskifti, ert tú vælkomin at seta teg í samband við okkum.




INFO@KES.FO - WWW.KES.FO - 258030

| | |
|---|---|
| Tóri **Traðará** | 1 |
| Elvio **Gelmini** | 2 |
| Jan **Ó. Ellingsgaard** | 3 |
| Tóri **N. Olsen** | 4 |
| Pól Jákup **Lundsbjerg** | 5 |
| Karl **A. Løkin** | 6 |
| Dánjal **á Lakjuni** | 7 |
| Ruben **Møller Nielsen** | 8 |
| Jhon Edy **Mena** | 9 |
| Jóhan **Petersen** | 10 |
| Markus **á Lakjuni** | 11 |
| Hans Jákup **J. Lervig** | 12 |
| Jákup **J. Nolsøe** | 13 |
| Gundur **E. Petersen** | 14 |
| Jákup **í Lambanum** | 15 |
| Líggjas **Heðinsson** | 16 |
| Jóhann **Højbro** | 17 |
| Petur M. **Lundsbjerg** | 18 |
| Rúnar **Johnsson** | 19 |
| Aron **Kensson** | 20 |
| Rógvi **Matras** | 21 |
| Elias **Lervig** | 22 |
| Hans **Jacobsen** | 23 |
| Gonzalo **Zárate** | 24 |
| Bergur **Jacobsen** | 25 |
| Sámal **Zachariassen** | 34 |

Høvuðsvenjari: **Aleksandar Jovevic**
Hjálparvenjari: **Bartal Eliasen**
Málmansvenjari: **Erling Joensen**
Fysiskur venjari: **Gudmundur Danielsen**
Fysioterapeutur: **Jónfríð Hansen**
Liðleiðari: **Rói D. Olsen**
Liðleiðari: **Heðin L. Olsen**
Liðleiðari: **Fríði R. Petersen**

INNIHALD

| | |
|---|---|
| Antonio **Borelli** | 1 |
| Nicklas **Mehl** | 3 |
| Ramzi **Idrissou** | 4 |
| Sam **Pollard** | 5 |
| Bjarni **Skála** | 6 |
| Emil **Sørensen** | 7 |
| Santiago **Lebus** | 8 |
| Ragnar **Skála** | 9 |
| Thomas **Junge** | 10 |
| Teitur **Olsen** | 11 |
| Rógvi **Skála** | 13 |
| Tróndur **á Høvdanum** | 14 |

| | |
|---|---|
| Bartal **Petersen** | 17 |
| Jákup P. **Breckmann** | 18 |
| Brian **Jacobsen** | 19 |
| Viktor **Benediktsson** | 23 |
| Jakob **Gottberg** | 24 |
| William **Tønning** | |
| Jens **Olsen** | |
| Dánjal **Danielsen** | |
| Gunnar **Reynslág** | |

Høvuðsvenjari: **Henrik Larsen**

Hjálparvenjari: **Morten Beck Overgaard**

**INNIHALD**

ARGJA BÓLTFELAG 1973

DÓMARI

Rúni **Olsen**

1. HJÁLPARDÓMARI

Jan **Andersen**

2. HJÁLPARDÓMARI

Pætur **E. Rasmussen**

4. DÓMARI

Kári **á Høvdanum**

DÓMARAEYGLEIÐARI

Jens **Midjord**

magn




Green Marine Divers
Tlf.: +298 77 00 60

# kvinnur

## 1. DEILD 2023

### Eyðun Ryggshamar, venjari hjá kvinnunum, tekur soleiðis saman um fyrireikingarnar til kappingarárið 2023.

Fyrireikingarnar til kappingarárið 2023 ganga sum heild væl. Vit hava nú vant síðan fyrst í januar so venjingarstøðan er á góðari leið.

Hetta er 3. árið at ÍF hevur tilmeldað lið í kvinnudeildini tað leggjast yngri leikarar afturat hvørt ár, samstundis sum fleiri av teimum meira royndu leikarunum halda fram. Harafturat eru nakrar byrjaðar aftur at spæla aftaná at hava verið í barnsburðarfarloyvi farna kappingaràr. Vit hava higartil bara spælt ein venjingardyst, har vit vunnu 3-0 á Toftum ímóti B68. Ætlanin er spæla fleiri venjingardystir hendan mánaðin.

**Hetta árið eru fleiri nýggj lið í 1. Deild so kappingin verður helst meira spennandi enn í fjør.**



Í fjør endaðu vit á einum fjórða plássi, og tað skulu vit helst betra um í ár. Við royndunum frá í fjør og „nýggju" leikarunum halda vit avgjørt at vit kunnu bjóða teimum flestu av hinum liðunum av. Harafturat er málið at seta fleiri av yngru kvinnunum við, soleiðis at tær kunnu gerast ein berandi partur av liðnum í framtíðini.

Eisini kunnu vit gleðast um at fleiri av U16 leikarunum eru lagdar afturat hópinum, og venja nú fast við. Tær hava tó ikki aldur hetta árið, men vit vænta og vóna at tað verður ein stórur styrkur, tá tær fáa loyvi at spæla við okkum næsta ár.

Alt í alt hava vit góðar vónir fyri kvinnufótbóltin í Fuglafirði og nú gleða vit okkum nógv til fyrsta dystin í Gundadali ímóti vinnarinum seinastu 2 árini, HB, tann 1. Apríl.

Brekkutún 4 | 188 Hoyvík | Tel. +298 30 88 00 | torshavn@samskip.com | www.samskip.fo



TÍTT FLUTNINGSFELAG

SAMSKIP

SPEKT | løggildir grannskoðarar

Tórshavn
Staravegur 17
Tel. 34 34 34

Klaksvík
Stangaskákið 1
Tel. 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo



# TOPP10

## MÁLSKJÚTTAR Í BETRI DEILDINI

| NR | NAVN | MÁL |
|---|---|---|
| 1 | Páll **Klettskarð** (KÍ) | 4 |
| 2 | Uros **Stojanov** (07 Vestur) | 1 |
| 3 | Bjarki **Nielsen** (B36) | 1 |
| 4 | Magnus **Egilsson** (B36) | 1 |
| 5 | Taufee **Skandari** (B36) | 1 |
| 6 | Sebastian Lau **Nielsen** (B68) | 1 |
| 7 | Gutti **Dahl-Olsen** (EB/Steymur) | 1 |
| 8 | Rógvi **Egilstoft** (EB/Steymur) | 1 |
| 9 | Jákup **Thomsen** (HB) | 1 |
| 10 | Mads **Borchers** (HB) | 1 |

WWW.DYSTUR.FO

SØGUBROT 2

# frá Fuglafjarðar fótbóltsfelag til Ítróttarfelag Fuglafjarðar

EFTIR: PETUR S. SIMONSEN

**Í „Søgubrotið 1" varð eitt nú komið inn á, tá Fuglafjarðar bóltfelag varð stovnað. Víst varð til fundarfrágreiðing, sum er dagfest 9. februar 1938, har tað m.a. stendur: „...nakrir bóltleikarar kalla saman til fundar í tí gamla skúlanum í Fuglafirði, og varð tá felag stovnað, ið varð nevnt Fuglafjarðar bóltfelag."**

Og seinni stendur eisini, hvørjir vóru valdir í nevndina, og at Poul Andreas Vørðhamar varð valdur til formann.

Tað er viðkomandi at spyrja, um nakað fótbóltsfelag ella bóltfelag er stovnað í Fuglafirði áðrenn 9. februar 1938.

Eri ikki vitandi um nakað skjal, sum beinleiðis staðfestir, at eitt fótbóltsfelag er skipað í Fuglafirði áðrenn februar 1938. Men kortini er tað nógv sum bendir á, at ein felagsskapur – formliga skipaður ella ikki – hevur verið í bygdini, sum hevur tikið sær av fótbóltinum, síðani hann tók seg upp fyrst í 20. øld, og til Fuglafjarðar bóltfelag varð stovnað í 1938. Niðanfyri verða trý viðurskifti nevnd.

**Dømi 1:**
Í Søgubrotið 1 varð nevnt, at fyrsti dysturin á nýgjørda vøllinum á Mølini á Eiði var í 1916, og at hann var millum eiðismenn og fuglfirðingar.

**Dømi 2:**
Vit vita eisini, at fuglfirðingar tey næstu 20 árini spældu fótbólt á sandinum móti feløgum úr grannabygdunum í Eysturoynni. Og at teir harumframt hava gjørt ymsar royndir at finna øki til ein annan fótbóltsvøll.

**Dømi 3:**
Fyrst í februar 1938 kemur bræv av Eiði, sum er stílað til „Fuglafjarðar fótbóltsfelag".

*Í brævinum verður m.a. sagt: „Á 25 ára festini hjá Eiðis fótbóltsfelag tann 25. januar, hava gamlir fótbóltsspælarar á Eiði givið Steyp til feløgini í Eysturoy at kappast um. Vit senda eitt avrit av teimum áløgdu treytunum og vóna, at tit taka væl við hesum tilboðum."*

Øll hesi viðurskiftini tala fyri, at ein felagsskapur hevur verið í bygdini, sum hevur tikið sær av fótbóltinum – kanska ikki skipaður í einum felag og við eini formliga valdari nevnd, men kortini við sama endamáli og somu uppgávum.

Tó, ivaleyst er tað brævið av Eiði, dagfest 1. februar 1938, um steyp og steypakapping, sum at enda fær ungu fuglfirðingarnar at taka seg saman og formliga stovna „Fuglafjarða bóltfelag". – Eitt felag, sum kann vísa á ein stovnandi aðalfund (tann 9. februar 1938), lóg/reglugerð, nevnd og formann.

Hini fótbóltsfeløgini í Eysturoynni um hetta mundi eru, sum nevnt í Søgubrotið 1, Eiðis bóltfelag (1913), Norðragøtu bóltfelag (1926) og Leirvíkar bóltfelag (1928).

**TRÝST HER FYRI AT LESA ALLA GREININA**



**Poul Andreas Vørðhamar**

*(1914 – 1992)*

*Formaður í Fuglafjarðar bóltfelag, tá tað varð stovnað 9. februar 1938.*



**Ismar Joensen**

(1919 – 2003)

*Var í fyrstu nevndini í Fuglafjarðar bóltfelag. Bleiv helst formaður í 1940. Myndin er úr bókini „Í skrift og talu".*

NÝRÙM

Teknistova
einar@nyrum.fo
tlf 78 88 99



BMT

Byggimestarin Thomsen

Tel 580044
Alt kann gerast


TAKK FYRI STUÐULIN

**Leiðandi reiðarí**
í norðurhøvum




VARÐIN
P/F Varðin | Garðabrekka 4 | FO-510 Gøtu | Tel 610600
vardin@vardin.fo | www.vardin.fo

OKKARA KJARNUØKI

**GRANNSKOÐAN**
ROKNSKAPARHJÁLP
**SKATTUR**
VIRKISRÁÐGEVING
**BÓKHALD**
MEIRVIRÐISGJALD



Skalt tú meta um framtíðina, mást tú kenna fortíðina.

Januar
LØGGILT GRANNSKOÐANARVIRKI

WWW.JANUAR.FO

# SYNGIÐ VIÐ

Í Fuglafirði mangan dystin leika
Í reyðum, hvítum klæðum eru tit
Á vølli allir leikarar nú reika
Og vinna dystin – ja, tað vilja vit.

**Vit eru ÍF-fan**
**Vit vita hvat ein kann**
**Vit eru best, og vinna hvat sum helst**
**Vit hava sett sum mál, at vinna hvørja sál**
**Nú Fuglafjørður hevur nátt sítt mál.**

Í deildini vit skulu verða bestir
Og vinna alt ið vinnast kann í dag
Jú, ÍF-leikarar teir eru treystir
Og fólkini tey gerast øll so glað.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Á vøllinum vit skulu standa saman
Um tað nú ikki gongur sum tað skal
Á bakkanum í álvara og gaman
Og vóna at tað gondur okkum væl.

**Vit eru ÍF-fan ...**

Vit armarnar í lofti nú upp hevja
Og kunnu ikki standa her í frið
Tá sjálvandi vit gullið kunnu tevja
Nú eiga vit jú Føroya besta lið.

**Vit eru ÍF-fan ...**